


www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 02 - 2013

# Stórur áhugi fyri oljumessu í Aberdeen

Hóast fleiri føroyskar fyritøkur longu hava sagt seg vilja luttaka á føroyska básinum á oljumessuni Offshore Europe í Aberdeen frá 3. til 6. september, so er framvegis pláss fyri enn fleiri fyritøkum. Freistin at tekna luttøku er 15. februar. Endamálið við føroysku luttøkuni á oljumessuni er at skapa møguleikar, sum kunnu vaksa um útflutningin av vørum og tænastum innan oljuvinnuna. Somuleiðis er føroyski landabásurin ein liður í altjóða branding av Føroyum. Føroyskar fyritøkur hava í fleiri ár luttikið á Offshore Europe annað hvørt ár, og á Offshore Northern Seas, sum verður hildin í Stavanger, annað hvørt ár. Einar 10-12 føroyskar fyritøkur plaga at verða við. Føroyski landabásurin verður samskipaður av Løgmansskrivstovuni - Promote Faroe Islands, saman við Oljuvinnufelagnum. Fyritøkur kunnu boða frá luttøku og fáa nærri kunning um føroyska landabásin hjá Biritu Nolsø á Løgmansskrivstovuni við at senda teldubræv til biritan@tinganes.fo ella við at ringja á 306114 innan 15. februar. Mynd Tey trý, sum fyriskipa føroyska básin á oljumessuni í Aberdeen, fv. Birita Nolsø frá løgmansskrivstovuni, Esther Dahl frá Vinnuhúsinum, og Ólavur í Geil Guttesen her inni á skrivstovuni hjá FOÍB á Bryggjubakka.